# KUNDASTOVNAN - PRIVATKUNDAR

NORÐOYA SPARIKASSI

Lógin um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi – ið allir peningastovnar skulu fylgja – setir krøv um, at sparikassin skal hava kunnleika til væntaða vavið av virkisøkinum eins og samleikaprógv frá øllum viðskiftafólkum. Á heimasíðu okkara kanst tú lesa um, hvussu innsavnaðu upplýsingarnar um teg verða nýttar.

Hervið verður tú biðin um at fylla viðlagda skjalið út og lata sparikassanum tað dagfest og undirskrivað.

Sambært galdandi lóg skulu vit dagføra niðanfyristandandi upplýsingar um teg. Tískil kann roknast við, at vit eftir tørvi vilja útvega okkum tær frá tær.

☐ Eg eri nýggjur kundi í Norðoya Sparikassa og havi útfylt allar teigarnar.

☐ Eg eri kundi í Norðoya Sparikassa og havi bert útfylt tær upplýsingar, ið sparikassanum vantar.

☐ Eg skal stovna barnasamansparing og havi útfylt allar teigarnar.

☐ Eg havi fulltrú ella eri virkiseigari og havi útfylt teigarnar: 1-3, 5-6 og 8-10.

## 1. Kundaupplýsingar

| | |
|---|---|
| Navn | P-tal |
| Gøtunavn og húsanummar | Postnummar og býur/bygd |
| Land | Teldupostur |
| Privattelefon | Arbeiðstelefon |
| Útbúgving | Starv ella starvsstøða |

Hevur tú bústað í øðrum landi enn Føroyum? *(skal skjalprógvast)* ○ Ja ○ Nei

## 2. Samleikaprógv *(minst eitt myndasamleikaprógv (pass, koyrikort) og eitt við bústaði og P-tali)*

Gyldugt myndasamleikaprógv:

☐ Pass ☐ Koyrikort ☐ Nationalt ID-kort ☐ Uppihaldsloyvi

Onnur gyldug prógv:

☐ Dóps- ella navnabræv ☐ P-talsváttan ☐ Bústaðarváttan *(ikki eldri enn 6 mðr.)* ☐ Sundhedskort

☐ TIN-nr. *(Tax Indentification Number)* ☐ Annað góðkent prógv: ____________________

*Er talan um eitt barn, skal samleikin hjá barninum og minst einum foreldri/verja prógvast.*
*Um barnið ikki hevur pass, kann samleikin hjá barninum prógvast við P-talsváttan saman við dóps- ella navnabrævi hjá barninum.*
*Er talan um persón, ið ikki hevur myndasamleikaprógv, skal samleikin prógvast við dóps- ella navnabrævi, P-talsváttan og bústaðarváttan.*

## 3. Endamál við kundasambandinum *(set møguliga fleiri krossar)*

☐ Daglig fíggjarviðurskifti *(løn, eftirløn, studningur o.a.)* ☐ Lán/kredittur ☐ Samansparing ☐ Virðisbrøv

☐ Ábyrgdari ☐ Fulltrúi ☐ Netbankafulltrú ☐ Virkiseigari

☐ Annað endamál - vinaliga greið frá: ____________________

## 4. Virkisvav

Virkisvav merkir, hvat kemur inn, og hvat fer av tínum kontum árliga.

Niðanfyri skulu upplýsingar um væntað árlig inn- og útgjøld skrásetast soleiðis:

- Flytingar
- Reiður peningur
- Uttanlandsflytingar

### 4.1 Væntaðar árligar flytingar á kontu

Fyll teir teigar út, sum eru viðkomandi fyri tíni fíggjarviðurskifti.

| Flytingar á kontu | Samlað upphædd |
|---|---|
| Løn – eftir skatt / B-inntøka | |
| Almannaveitingar | |
| Studningur | |
| Samansparing | |
| Arvur og gávur | |
| Leiguinntøkur | |
| Avkast frá íløgum | |
| Flytingar umvegis gjaldkort | |
| Annað* | |
| *Greið nærri frá hesum: | |

### 4.2 Væntað árlig inngjøld í reiðum peningi

Niðanfyri eru dømi um endamálini við inngjøldunum í reiðum peningi. Fyll teir teigar út, sum eru viðkomandi fyri tíni fíggjarviðurskifti.

| | |
|---|---|
| Tal av inngjøldum um árið (stk.) | |
| Størsta einstaka inngjald í reiðum peningi (einstøk upphædd) | |

Greið nærri frá hesum inngjøldum í reiðum peningi niðanfyri:

| Inngjald í reiðum peningi | Samlað upphædd |
|---|---|
| Gávur | |
| Søla av privatum vørum | |
| Samansparing | |
| Annað* | |
| *Greið nærri frá hesum: | |

## 4.3 Væntað árlig útgjøld í reiðum peningi

Niðanfyri eru dømi um endamálini við útgjøldunum í reiðum peningi. Fyll teir teigar út, sum eru viðkomandi fyri tíni fíggjarviðurskifti.

| | |
|---|---|
| Tal av útgjøldum um árið (stk.) | |
| Størsta einstaka útgjald í reiðum peningi (einstøk upphædd) | |

Greið nærri frá hesum útgjøldum í reiðum peningi niðanfyri:

| **Útgjald í reiðum peningi** | **Samlað upphædd** |
|---|---|
| Gávur | |
| Keyp av privatum vørum | |
| Daglig nýtsla | |
| Annað* | |
| *Greið nærri frá hesum: | |

Fert tú regluliga at fáa peningaflytingar, sum verða tiknar út í reiðum peningi? ◯ Ja ◯ Nei

Um ja, greið nærri frá hesum: ____________________

## 4.4 Væntaðar árligar flytingar til og frá útlondum umvegis netbanka og gjaldkort

Fara flytingar til/frá útlondum umvegis tínar kontur? ◯ Ja ◯ Nei

Um ja, skalt tú niðanfyri upplýsa, hvørjar flytingar til/frá útlondum fara umvegis tínar kontur og endamálið við teimum.

Væntaðar flytingar **TIL** útland

| **Til land** | **Tal av flytingum** | **Upphædd** | **Endamál*** |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**Flyting til familju, gáva, ferðing, keyp av privatum vørum, spæl, íløga, ferðabústaður o.a.*

Væntaðar flytingar **FRÁ** útlandi

| **Frá landi** | **Tal av flytingum** | **Upphædd** | **Endamál*** |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**Løn frá útlendskum arbeiðsgevara, flyting frá familju, gáva, ferðing, søla av privatum vørum, íløga, ferðabústaður o.a.*

## 5. Politiskt útsettur persónur

Ein politiskt útsettur persónur skal skiljast sum persónur, ið hevur ella hevur havt eina hægri almenna funksjón, t.d. landsstýrisfólk, løgtingslimur, vara-løgtingslimur, stjórnarlimur, floksformaður, sendifólk ella stjóri í almennari fyritøku v.m.

Ert tú ein politiskt útsettur persónur? ◯ Ja ◯ Nei

Um ja, hvussu? ____________________

## 5.1 Nærstandandi og tættir samstarvsfelagar hjá politiskt útsettum persónum

Tey, sum í hesum høpi eru nærstandandi hjá einum politiskt útsettum persóni, eru:

- hjúnafelagi/persónur í skrásettum parlagi ella sambúgvi
- børn og hjúnafelagi/persónur í skrásettum parlagi ella sambúgvi hjá børnum
- foreldur, hjúnafelagi/persónur í skrásettum parlagi ella sambúgvi hjá foreldrum

Tey, sum í hesum høpi eru tættir samstarvsfelagar, eru í stuttum persónar, sum hava virki saman við politiskt útsettum persóni ella á annan hátt hava tætt samstarv við politiskt útsettan persón.

Ert tú nærstandandi við ella tættur samstarvsfelagi hjá einum politiskt útsettum persóni? ◯ Ja ◯ Nei

Um ja, hvør er politiskt útsetti persónurin, og hvat er tykkara tilknýti? ______________________

______________________

______________________

## 6. Tjóðskapur

| | |
|---|---|
| Primerur | Føðiland og føðibýur/-bygd |
| Sekunderur | |

## 7. Skattaskylda

Hevur tú seinastu 2 árini havt skattskyldu í øðrum landi enn Føroyum? ◯ Ja ◯ Nei

Um ja, upplýs land, TIN-nr.* og frá/til:

| | | |
|---|---|---|
| Land | TIN-nr. | Frá og til |
| Land | TIN-nr. | Frá og til |

** TIN-nummar er: Samleika-nummar. Í Danmark er tað t.d. CPR-nummarið. TIN-nummarið skal skjalprógvast t.d. við útlendskum passi.*
*Um tú kemur undir skattskyldu uttanlands, skal sparikassin boða skattamyndugleikunum her frá tí, ið síðani boða skattamyndugleikunum í tí landinum ella teimum londunum, har tú ert skattskyldug/ur, frá.*

Hevur tú skattskyldu í USA/Canada?

◯ Ja Eg vátti, at eg eri amerikanskur/canadiskur ríkisborgari og/ella undir skattskyldu í USA/Canada, og at eg omanfyri havi ávíst USA/Canada, sum eitt av teimum londum, eg havi skattskyldu í.

◯ Nei Eg vátti, at eg hvørki eri amerikanskur/canadiskur ríkisborgari ella havi skattskyldu í USA/Canada.

*Sparikassin skal gera vart við, at viðskiftafólk, ið eru búsitandi í ella statsborgarar í USA ella Canada, **ikki** kunnu stovna goymslur ella handla við virðisbrøvum ella -skjølum í Norðoya Sparikassa. Hetta er eisini galdandi fyri viðskiftafólk, ið eru statsborgarar í meiri enn einum landi, har eitt av londunum er USA og/ella Canada.*

## 8. Handlar tú egna vegna?

Handlar tú egna vegna? ◯ Ja ◯ Nei

Um nei, vinarliga upplýs, hvørs vegna tú handlar:

| | |
|---|---|
| Navn/virki | P-tal/V-tal |
| Gøtunavn og húsanummar | Postnummar og býur/bygd |
| Land | Telefon/fartelefon |
| Vinarliga upplýs orsøkina til, at tú luttekur vegna triðjamann | |

## 9. Samtykki

Kundi tú hugsað tær kunning um tænastur og góð ráð, skalt tú geva okkum samtykki til, at vit kunnu seta okkum í samband við teg.

Fyri at fáa sum mest burtur úr at vera kundi í Norðoya Sparikassa, vilja vit fegin kunna teg um tænastur, sum eru viðkomandi fyri teg, eitt nú:

- Kunning um tænastur hjá Norðoya Sparikassa
- Kunning um tænastur hjá samstarvsfeløgum hjá Norðoya Sparikassa
- Innbjóðing til kundatiltøk
- Kunning um kappingar o.a.

Eg gevi hervið samtykki til, at Norðoya Sparikassi kann seta seg í samband við meg umvegis netbankan, teldupost ella á telefon í sambandi við nýggjar og/ella viðkomandi tænastur.

◯ Ja ◯ Nei

Tú kanst til eina og hvørja tíð taka samtykkið aftur. Hetta gert tú við at venda tær til okkara á ns@ns.fo ella á telefon 475000.

## 10. Kundaváttan

Eg vátti við hesum, at tær upplýsingar, eg havi latið Norðoya Sparikassa, eru rættar og fullfíggjaðar.

Eisini vátti eg at hava lisið og góðtikið »Vanligar viðskiftatreytir hjá Norðoya Sparikassa«, sum eru á heimasíðuni www.ns.fo.

*Staður:* ______________________ *Dagfesting:* ______________________

*Undirskrift hjá kunda:* ____________________________________________